## Fleiri hjáárin av koppingarevninum

Í Noregi hava heilsumyndugleikarnir fingið meiri enn 100 fráboðanir frá fólki, sum hava fingið ymisk hjáárin, eftir at tey eru vorðin koppsett ímóti Influensa A. Norska kringvarpið NRK sigur, at tey mest álvarssomu hjá-árinini av koppingarevninum eru, at fólk svíma, fáa krampa ella trupulleikar við andadráttinum. Onnur kæra seg um svøvnloysi og magatrupulleikar. Í Noregi eru tvey fólk deyð, eftir at tey vórðu koppsett, men heilsumyndug-leikarnir siga tað ikki vera prógvað, at tað hevði nakað samband við koppingarevnið. Í Danmark hava myndugleikarnir fingið 13 fráboðanir um hjáárin, men talan er ikki um álvarsligar tilburðir, sigur DR.



## Fylgja fiskifrøðingunum

Grønlendska landsstýrið fer at gera eftir tilmælinum frá fiskifrøðingunum, sum hava mælt politikarunum at skerja rækjukvotuna við Vesturgrønland næsta ár. Tað sigur Ane Hansen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum. Fiskivinnu-feløgini hava ikki gjørt sínar viðmerkingar til tilmælið frá fiskifrøðingunum, men sambært KNR fara feløgini at taka undir við tí, tí vinnan vil hava rækjufiskiskapin altjóða góð-kendan sum burðardyggan. Roknað verður við, at 135.000 tons av rækjum verða veidd við Vesturgrønland í ár, men fiskifrøðingarnir siga, at næsta ár eigur veiðan ikki at fara upp um 110.000 tons.

Deyðsvanlukkan á Polarhav:

# Høvdu møguliga kunna bjargað manninum




**Vanliga bjargingar-tyrlan hjá Atlants-flogi var ikki tøk, og Lynx-tyrlan hevur ikki eina højst-sól, sum verður brúkt í bjargingararbeiði í myrkri. Millum annað tí varð ikki mett ráðiligt at fara undir bjargingar-arbeiðið**

VANLUKKA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein deyðsvanlukka varð umborð á Polarhav, sum varð staddur 27 sjómíl úr Akrabyrgi.

Fráboðanin kom til MRCC klokkan 18.07.

Sambært Jón Klein Olsen, løgregluleiðara, hevur maðurin fingið ein veir í búkin ella undir síðuna og løsturin hevur verið sera álvarsamur, so hann doyði av honum.

Maðurin, sum er 29 ára gamal og hevði verið fyltur 30 ár mánadagin, er búsitandi á Viðareiði, men er ættaður úr Vestmanna.

Tyrlan fekk ikki farið eftir manninum, tí hon var ikki tøk, varð fráboðanin, men Magni Arge, stjóri í Atlantic sigur í viðmerking til Vágaportalin, at tiltakstyrlan var tøk til sjúkraflutning í gjárkvøldi, men manniningin á bjargingartyrluni metti tað ikki ráðiligt undir teimum umstøðum sum vóru, at fara til havs og lyfta mann av skipi og upp í tyrluna.

### Manglar útgerð

Sambært MRCC, sum samskipar bjargingararbeiðið, var bjargingartyrlan hjá Atlantsflogi ikki tøk, tí at arbeitt verður í løtuni við at skifta rotorin á tyrluni, og at hon tí er »groundað«.

Tiltakstyrlan er tyrlan hjá Færøernes Kommando, Lynx-tyrlan, men hon hevur ikki neyðugu útgerðina, sum hevði verið kærkomin í slíkum bjargingararbeiði.

Sambært MRCC manglar henda tyrlan eina højst-sól, sum verður nýtt tá fólk skulu lyftast upp í tyrluna í myrkri, nakað sum tyrlan hjá Atlantsflog hevur.

- Men tað er als ikki sikkurt at tyrlan hevði kunnað farið óansæð, sigur Robert Olsen av MRCC.

Sambært honum var veðrið eisini sera ringt, og vóru tað máldir heilt upp í 26 metrar um sekundið.

- Flogskiparin metti ikki at tað var ráðiligt at fara undir bjargingararbeiðið, og ábyrgdin liggur til eina og hvørja tíð hjá honum, sigur Robert Olsen.

Harafturat vóru eingir bjargarar, sum kundu fara við tyrluni, tí at tað ber ikki til at bara flyta bjargingarfólk beint úr tyrlunum hjá Atlantsflog til tyrluna hjá FKR.

Bjargingarmennirnir hjá FRK vóru í Skotlandi, har teir eru til venjing, verður upplýst.

Roynt var tí at sigla inn móti Suðuroynni, har lækni skuldi standa fyri teimum og taka ímóti, men klokkan 21.19 kom fráboðanin, at maðurin varð deyður.

## Johan Dahl kannar málið



*Johan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, heldur, at sparingarnar helst kunnu vera minni, tí tað sær út til, at hann kanska fær meira játtan*

Løgmaður hevur sagt, at tað kanska ber til at hækka karmin, og eg fari at kanna, um tað ikki ber til, at syrgja fyri, at skerjingarnar vera eitt vet minni.

Men hann viðurkennir, at samfelagið koyrir tungt í løtuni, og tí mugu sparingar gerast í rakstrinum á nógvum økjum.

- Mann má síggja í eyguni, at øll mugu gera sítt. Harímillum verður neyðugt við sparingum hjá Strandfarskipum landsins, men tingini glíða aðrastaðni, og tí fari eg at kann, um hon kann sleppa eitt sindur léttar, sigur Johan Dahl.

- Tað kann ikki bera til, at nakrir sektorar fáa í posa og sekk og onnur mugu bløða, sigur hann.

Hann vísir tó á, at sparingarnar eru gjørdar so skynsamar sum gjørligt.

- Vit síggja, at summarsiglingin á Suðuroyarleiðini ikki verður skerd og tað verður á vetrarhálvuni, at skerjingar verða gjørdar, sigur Johan Dahl.

Viðvíkjandi mótmælunum hjá borgarstjórunum á Suðuroyggjunum, sigur Johan Dahl, at teir mugu skilja, at sparingar vera gjørdar, men hann fer at kanna, um tað ikki ber til at gera okkurt.

-eij

## - Jóhan Dahl grevur landsveg av

Allir borgarstjórarnir í Sandoy heitaá Jóhan Dahl, landsstýrismann við Vinnumálum, at lata vera við at skerja túratalið hjá Teistanum komandi ár.

- Hetta er tað sama sum at grava ein landsveg av, siga borgarstjórarnir í skrivi í dag.

Teir leggja afturat, at Teistin er teirra forlongdi armur til miðstaðarøkið, at umstøðurnar eru ringar sum er og hetta, við at skerja teir síðstu túrarnar og túrar sum heild, kann verða banahøggið til Sandoynna.

Sum ætlanin hjá Strandferðsluni er í dag við túrunum til Sandoynna komandi ár, tí sparingar skulu gerast, verða 14 túrar færri um vikuna.

Tað vil siga, at verður ætlanin veruleiki, so verða 108 túrar heldur enn 122 um Skopunarfjørð um vikuna.

- eij



Køkshjálp

Effo søkir eftir køkshjálp, 4 tímar um dagin, frá kl. 10.00-14.00, tó mikudag frá kl. 08.00-14.00. Starvið fevnir um innkeyp og matgerð í køkinum á høvuðsskrivsstovuni á Óðinshædd í Tórshavn. Harumframt skal viðkomandi hjálpa til í sambandi við tiltøk og fundir.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið er tímalønt.

Áhugaði kunnu seta seg í samband við Sverra Kallsberg á tel 34 35 21 ella við at senda teldupost til ska@effo.fo. Starvið verður at seta skjótast tilber.

effo føroya orkufelag

Pf. Effo Postboks 3098 110 Tórshavn
Tel +298 34 35 00 Fax +298 34 35 01 www.effo.fo